## Campbell gevst í Arsenal

Verjuspælarin Col Campbell hevur nú boðað frá, at hann fer at skifta felag. Seinastu fimm árini hevur Sol Campbell spælt fyri enska felagið Arsenal, og tann 31 ára gamli verjuspælarin hevur spælt 197 dystir fyri Arsenal hesa tíðina. Nú er tað greitt,a t Campbell fer at spæla fyri eitt annað felag, tá ið europeisku kappingarnar byrja aftur í august. Campbell kundi hugsa sær at roynt seg í útlandinum.
- Sol hevur verið ein risi fyri okkum, men vit virða hansara avgerð um at skifta felag, sigur Arsenal-venjarin Arsene Wenger.
Campbell spældi við í einum av dystunum hjá Onglandi undir HM í Týsklandi og hevur samanlagt spælt 69 landsdystir fyri Ongland.

## Rógvi rýmir undan Millwall



Rógvi Jacobsen valdi um vikuskiftið at leita heimaftur til føroyskan fótbólt at spæla, og fram til 2008 skal hann umboða HB í føroysku kappingini. KR, sum Rógvi hevur spælt fyri seinatu tíðina, skal týskvøldið spæla venjingardyst ímóti enska felagnum Millwall, sum er farið á venjingarlegu í Íslandi. Millwall hevur spælt ein dyst ímóti Drátti og tapti 2-0. Týskvøldið royna teir seg ímóti KR, sum nú ikki longur hevur Rógva Jacobsen millum spælararnar.

VB/Sumba-HB 1-1 (1-0):

# VB/Sumba vardi seg til javnleik

*VB/S*

*HB*

**VB/Sumba skoraði tíðliga í dystinum og so løgdu teir dent á verjuspælið. Tað var líka við, at teir kláraðu at fáa øll trý stigini heim, men í seinna hálvleiki javnaði HB við brotssparki**



*HB stríddist av øllum alvi fyri at skora, men teir á heimaliðnum vardu manniliga allan dystin, og tað var um reppið, at teir fingu øll trý stigini burturúr dystinum*
*Mynd: Áki Bertholdsen*

VB/SUMBA-HB
*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

Mest óvæntaða úrslit hetta vikuskiftið var í Vági, har VB/Sumba fekk javnleik ímóti HB. Víst var VB/Sumba á heimavølli, og víst hava teir fingið onkur góð úrslit í ár, men tey flestu mundu roknað við, at HB fór at reisa seg eftir stórtapið ímóti B36.

Dysturin hjá HB ímóti botnliðnum úr Suðuroy spældi tó ikki soleiðis av, sum HB'arnir fegnir høvdu viljað. VB/Sumba kom á oddatíðliga í dystinum, og so hevði HB stóru uppgávuna at bróta ígjøgnum tøttu suðuroyarverjuna. Tað eydnaðist sjáldan, og tí fekk HB ikki teir mongu stóru kjansirnar, sum stóra leikliga yvirvági legði upp til.

Einaferð eydnaðist tó at skora, og tað var, tá ið dómin bríkslaði fyri brotssparki. Teir á heimaliðnum hildu ikki, at nakað brot varð gjørt ímóti Jákupi á Borg, men dómarin ivaðist ikki og peikaði á brotssparksblettin.

### Nógvar broytingar hjá VB/Sumba

VB/Sumba legði seg fram um 1-0 eftir bert 12 minuttir. Málskjútti var Palli Augustinussen, sum er heima í summarfrí og hjálpir gamla felagnum hjá sær. Birgir Jørgensen, sum skuldi royna at temja nógvar langar bóltar í dystinum, var við í uppspælinum til málið, sum kom óvart á vertirnar.

VB/Sumba stillaði aftur hesaferð við tveimum serbiskum spælarum á liðnum, men teir vórðu noyddir at umskipa longu eftir góðar 20 minuttir, tá ið verjuspælarin Kári Lisberg noyddist av vøllinum við skaða.

Fleiri av føstu spælarunum manglaðu – Evrard Ble, Hallur Dam Joensen, Súni úr Hørg og Dan Djurhuus – og tí kom tað væl við, at Dánjal Johan Joensen og Palli Augustinussen vóru tøkir.

HB manglaði spælstýraran á miðvøllinum. Kári Nielsen hevði leikbann eftir fimm gul kort, og tí var tað litið upp í hendurnar á Vagni Mohr Mortensen at spæla á miðvøllinum saman við Ólavi í Ólavsstovu og Róki av Fløtum Jespersen.

### Fáir stórir kjansir

Eftir at VB/Sumba hevði lagt seg fram um 1-0, løgdu teir seg aftur á vøllin at verja. HB trýsti nógv, og tað var viðvirkandi til, at spælið gjørdist rættiliga einvegis tað, sum eftir var av dystinum. HB royndi við øllum hugsandi snildum at lata verjuna hjá VB/Sumba upp, men tað gekk einki serligt við tí.

HB hevði sjálvsagt royndir á málið, men teir stóru kjansir vóru ikki nógvir í tali. Skotini úti frá bitu ikki rættiliga á Marcin Dawid í málinum hjá heimaliðnum, og ferð eftir ferð komu verjuspælararnir í vegin, tá ið HB royndi at spæla ella renna seg til kjansir.

Miðskeiðis í seinna hálvleiki fekk HB forloysandi málið, og tað skoraði Vagnur Mohr Mortensen við brotssparki. Eftir hetta legði HB alt meira fyri í royndini at fáa sigursmálið, men teir á heimaliðnum stríddust manniliga, og tað eydnaðist teimum at fáa javnleik burtur úr dystinum.

VB/Sumba hevur fingið fimm stig burtur úr teimum seinastu trimum dystunum, og tað er munandi meira, enn liðið hevur fingið í miðal í teimum undanfarnu dystunum í kappingini.

HB kláraði ikki rættiliga at fóta sær eftir tapið ímóti B36, og eitt stig í tveimum teimum seinastu dystunum er ikki nóg mikið til at halda fast í oddinum. HB fær ein nýggjan møguleika sunnudagin, tá ið B68 vitjar í Gundadali.

## Javnleikur var vónbrot

Verjuálitið hjá HB, Rasmus Nolsøe, var vonbrotin um, at tað ikki eydnaðist HB at vinna dystin í Vági sunnudagin.

– Vit fóru til Vágs eftir øllum trimum stigunum, tí vit høvdu brúk fyri teimum, og tað var skuffandi, at tað ikki eydanðist okkum at vinna, segði hann.

– VB/Sumba fekk eitt mál tíðliga í dystinum, og so kundu teir spæla verjuspæl restina av tíðini. Tað var sera trupult hjá okkum at spæla okkum til opnar kjansir, tí teir lógu so aftarliga og vardu við so nógvum spælarum. Sunnudagin skal HB spæla seinasta dystin fyri summarsteðgin, og tá vitjar B68 í Gundadali.

– Kravið hjá okkum til tann dystin er sera einfalt, vit skulu hava øll trý stigini, sigur Rasmus Nolsøe.

## – Vit kundu havt vunnið

Venjarin hjá VB/Sumba var harmur um, at hansara lið ikki kláraði at hála sigurin í land. Tey trý stigini gjørdust til eitt stig seint í dystinum, tá ið HB javnaði við brotssparki.

– Vit kundu havt vunnið dystin, tí vit vardu sera væl. Brotssparkið, sum HB fekk, skuldi ikki verið dømt, sigur Ole Andersen.

Hann heldur, at seinastu dystirnir hava víst eina positiva gongd hjá VB/Sumba. Fyri viku síðani vann VB/Sumba á útivølli í Fuglafirði, og í gjár fingu teir javnleik ímóti HB.

– Vit eru á rættari leið, og vit hava góðar vónir til restina av kappingini, sigur Ole Andersen.